gult16 cyan16 magenta16 svart16



# Gera virki fyri 150 milliónir krónur í Vági

**– Ítøkiligar ætlanir eru um at gera íløgur fyri 15 milliónir í vinnuvirki av ymsum slagi í Vági. Hesi virkini fara at geva arebiði til eini 120-150 fólk**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*



*Tað blíðkar fyri hugaðum monnum. Á økismenningarfundinum í Vági mánakvøldið, fingu áhoyrarnir at vita, at ætlanin er at gera íløgur fyri heilar 150 milliónir í Vági*

*Mynd: Jens K. Vang*

Gongst sum ætlað verða fiskavirki fyri einar 150 milliónmir krónur sett á stovn í Vági í næstum.

Fá, ella ongi pláss í landinum hava verið so hart rakt av kreppuni, sum Vágsbygd, men hesi seinastu árini hevur tað gingið framá aftur.

Og nú eru ítøkiligar ætlanir um at gera íløgur fyri 150 milliónir krónur í virki av ymsum slagi í Vági.

Í Økismenningarálitinum, sum varð almannakunngjørt mánakvøldið, verður upplýst, at talan er um virki í alivinnuni og í uppisjóvarvinnuni, sum ætlanin nú er at seta á stovn í Vági.

Eitt nú hava vit fingið uppspurt, at Heri Hjelm, ætlar at leiga gamla flakavirkið Polarfrost frá Føroya Fiskavirking. Har ætlar hann at gera eitt laksavirki, sum skal geva arbeiði til yvir 100 fólk.

– Alivinnan hevur verið fyri stórari menning seinastu árini. Eisini eru eigaraviðurskiftini broytt, so at í nú er bara ein alari í Suðuroy. Hetta hevur ført við sær, at alivinnan nú tykist vera ein tann vinnan, ið hevur størstar menningarmøguleikar í Suðuroy, sigur økismenningarálitið.

Umframt laksavirkið hjá Hera Hjelm, ætla Johan Dahl, og onnur, at gera byggja frystigoymsluna sum er í Vági, út. Haraftaurat ætla teir at gera eitt uppisjóvarvirki, sum eisini gevur arbeiði til nøkur fólk.

Økisálitið sigur, at samanlagt fara hesar íløgurnar at skapa arbeiðspláss fyri upp ímóti 150 fólkum.

Verða hesi virkini til veruleika, fara tey at hava ein útflutning uppá eini 50.000 tons av fiskavørum um árið, og tað fer at gera Vág til eitt av størstu fiskivinnuplássum í landinum.

### Hevur ment aðrar vinnur

Økismenningarálitið sigur, at rundanum fiskivinnuna og alivinnuni hava eisini aðrar vinnur í økinum ment seg.

Hetta eru vinnur , sum í nógvum førum beinleiðis eru knýttar at fiskivinnuni og alivinnuni sum veitarar.

– Hetta hevur m.a. verið galdandi fyri jarnsmíð og smiðjuvinnu. Eisini tykjast stórir møguleikar at vera í nýggja lemmavirkinum í Vági, samstundis sum samstarv millum smiðjur á Tvøroyri og í Vági kann gerast ein stórur fyrimunur í framtíðini.

### Betri samband

Økismenningarálitið ger tó samstundis vart við, at at ætlaðu íløgurnar í Vági eru tengdar at møguleikunum fyri beinleiðis sambandi við útheimin.

Hetta setir so aftur økt krøv til bryggjukant og dýpið í havnini.

Í hesum sambandi eru ítøkiligar ætlanir um at gera eina sokallaða djúpvatnshavn í Vági,

– Um ætlanin gerst veruleiki, er hetta er eitt ítøkiligt dømi um, at kommuna og land skapa karmar, til tess at stórar privatar íløgur kunnu gerast veruleiki.

– Ein beinleiðis farmaleið úr Vági á evropiska og ameriska meginlandið kann somuleiðis skapa nýggjar møguleikar fyri fiskaframleiðarar í Suðuroy sum heild, sigur økismenningarálitið.

# Framtaksgrunnurin eigur at stuðla vinnulívi í útjaðaranum

**– Fíggingarstovnarnir seta størri krøv til virki í útjaðaranum, enn til virki í Havn. Tí skuldi Framtaksgrunnurin verið umskipaður, so at hann í størri mun kundi stula virksemi úti um landið, sigur Økismenningarbólkurin**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*

– Tað er stórur tørvur er á einum økismenningarfíggingarstovni í Føroyum.

Tað er ein av niðurstøðunum hjá Økismenningarbólkinum, sum legði álitið fram mánakvøldið

Bólkurin vísir á, at fígging hevur sjálvsagt avgerandi týdning fyri møguleikan at reka vinnuligt virksemi á einum staði ella í einum øki.

Men tað er stórur munur á, hvussu møguleikarnir eru at fáa fígging í teimum ymsu pørtunum í landinm.

– Eins og munur er á, hvussu nógv virksemi er ymsastaðni í landinum, er tað eisini stórur munur á, hvussu fíggingarmøguleikarnir eru.

Økismenningarbólkurin sigur, at sum heild verða størri krøv sett til verkætlanir í útjaðaranum enn í miðstaðarøkinum.

Og miðstaðarøkið, tað er í hesum føri stórir partar av Streymoy og Eysturoy.

– Heildarmyndin er sostatt tann, at fíggingarstovnar síggja størri váða í at fíggja eitt virki, ið er í t.d. Sandoy enn teir høvdu sæð í at fíggja sama virkið í Havn .

– Í sjálvum sær ger hett, at sjálv landafrøðiliga staðsetingin kann vera ein forðing, tá ið ein hevur ætlanir um at seta á stovn virki .

Og hetta darvar hetta sostatt allari vinnuligari menning uttan fyri miðstaðarøkið, sigur Økismenningarbólkurin.

### Broyta Framtaksgrunnin

Bólkurin sigur, at í londunum rundanum okkum, eru almennir fíggingarstovnar og –grunnar, ið hava til endamáls at taka henda eyka váða, uppá seg, ið vanligu fíggingarstovnarnir meta er til staðar, tá ið metast skal verkætlanir í útjaðaranum.

– Slíkir stovnar kundu tikið størsta váðan í verkætlanini á seg, soleiðis at vanligu fíggingarstovnarnir ikki mettu størri váða vera við eini verkætlan í Sandoy enn eini verkætlan í Tórshavn, bara orsakað av landafrøðiligari staðseting.

– Í hesum sambandi hevði tað verið ein gongd leið at broytt viðtøkurnar fyri Framtaksgrunnin, soleiðis at hann kundi virkað sum ein fíggingarstovnur, ið tók á seg størsta váðan í sambandi við verkætlanir í útjaðaranum.

– Sum nú er, metir Framtaksgrunnurin verkætlanir einans út frá møguleikunum at vinna pening, eins og vanligu fíggingarstovnarnir gera.

Harumframt heldur økismenningarbólkurin, at ein ætlan sum Sandoyar-ætlanin hevði økt munandi um møguleikarnar í t.d. syðru helvt av Suðuroy, sum enn er sera hart rakt av kreppuni.

Bólkurin sigur, at verður hugt eftir miðallønarútgjaldingunum í Føroyum frá 1995 til 1999, er tað áhugavert at síggja, at tað er Sandoyggin, sum hevur havt tann næststørsti veruliga vøksturin og tann størsta vøksturin í prosentum.

– Hetta prógvar, at lokalar loysnir, sum Sandoyarætlanin var, har tað almenna stuðlaði vinnuna, tá ið hon ikki megnaði sjálv, bera ávøkst.

– Og ivaleyst er hetta ein gongd leið í fleiri førum, heldur enn at gera torskildar lógarloysninr, ið ikki føra nakra mennin við sær, hóast tað er ætlanin við teimum.

gult17 cyan17 magenta17 svart17



*Her er gjørt upp, hvussu stórur partur av teimum, ið vóru í vinnu í 1995 og i 1999, høvdu høvuðsinntøku sína í tí bólkinum, sum nevnist “almennar tænastur o.a.”. Flestu almennu arbeiðsplássini eru í Tórshavn, har út við helvtin hevur sína høvuðsvinnu innan almennar tænastur o.a.*




*Í hendan myndin vísur, at ein heilt stórur partur av størvunum innan ’almennar tænastur o.a.’ eru í Tórshavn. Prosentparturin av almennum størvum í Havn er nógv størri enn prosentparturin av føroyingum, sum býr í Havn*




# Næstan annaðhvørt fólk í Havn hevur alment starv

**– Næstan annaðhvørt fólk í Havn, sum er í vinnu, hevur alment starv vísir ein uppgerð, sum økismenningarbólkurin hevur gjørt**

ØKISMENNING
*Áki Bertholdsen*

– Tað er ikki so løgið, at tey flestu almennu størvini eru í Havn. Men at yvirumboðanin skuldi vera so stór, sum hon er, mundi tó fá geva sær far um.

Tað sigur økismenningarnevndin í álitinum, sum hon almannakunngjørdi mánakvøldið.

Sum tað sæst av greinini á síðu 18, skjýtur økismenningarnevndin upp at liða almennu umsitingina sundur og spjaða hana út um alt landið.

Í tí sambandinum hevur bólkurin eisini hugt at, hvussu nógv fólk hava alment starv ymsastaðni í Føroyum.

Økismenningarbólkurin sigur, at tað er ikki størvegis munur á miðal lønarútgjaldingunum til fólk í almennum tænastum úr einum øki í annað. Ein vanligur lærari, ið hevur verið lærari í 10 ár í Suðuroy, fær somu løn sum ein vanligur lærari í Suður Eysturoy.

– Tó er miðal lønarútgjaldingin í Tórshavn væl yvir miðal í ávísum bólkum av teimum almennu tænastunum. Hetta kemst m.a. av, at tey flestu høgtløntu størvini eru í høvuðsstaðarøkinum. Hartil eru flestu høgu leiðarastørvini í Tórshavn

### Helvtin í Havn

Í mynd 6 er gjørt upp, hvussu stórur partur av teimum, ið vóru í vinnu í 1995 og i 1999,

høvdu høvuðsinntøku sína í tí bólkinum, sum nevnist “almennar tænastur o.a.”.

Flestu almennu arbeiðsplássini eru í Tórshavn, har út við helvtin hevur sína høvuðsvinnu innan almennar tænastur o.a.

Men parturin av teimum, ið hava alment starv sum høvuðsvinnu í restini av landinum, er á leið hin sami úr einum øki í annað, tó at Eysturoy sum heild er nakað undir miðal.

Stovnar, sum t.d. sjúkrahús, miðnámsskúlar, flogvøllur, hava stóra ávirkan á, hvussu stórur partur av fólkinum hevur almennar tænastur o.a. sum høvuðsvinnu.

Prosentparturin er eisini í ein ávísan mun ávirkaður av, hvussu nógv fólk eru í vinnu sum heild, t.e. hvussu stórt arbeiðsloysið er.

Eru lutfalsliga fá fólk í vinnu í t.d. Suðuroy, viga almennir stovnar sum Suðuroyar Sjúkrahús, Suðuroyar Ellis- og Røktarheim og Miðnámsskúlin í Suðuroy nógv, tá ið gjørt verður upp, hvussu stórur partur av teimum, ið eru í vinnu í Suðuroy, hava “almennar tænastur o.a.” sum høvuðsvinnu.

Ein annar máti at gera upp, hvussu býtið av almennum størvum er, er at gera upp, hvussu nógv almenn størv eru eru í einum øki afturímóti fólkatalinum í økinum.

Hetta sæst í mynd 7. Í henni verður staðfest, at ein heilt stórur partur av størvunum innan ’almennar tænastur o.a.’ eru í Tórshavn, t.e. at har er ein størri prosentpartur av størvunum innan ’almennar tænastur o.a.’, enn parturin av fólkinum í Føroyum, sum býr í økinum.

– Í sjálvum sær er hetta ikki so løgið, við tað at flestu almennir stovnar hava høvuðssæti í høvuðsstaðnum. Tó mundu fá geva sær far um, at yvirumboðanin er so stór, sum hon er, sigur økismenningarbólkurin.

